Til Føroya Løgting
Løgtingsins Fíggjarnevnd
Tórshavn

Viðvíkjandi løgtingsmálið LM-019/2025

Tað var ikki gamalt, at Løgtingið lóggav afturvirkandi!
Men tað verður gjørt, um Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðirgjald (Meirvirðisgjaldslógin) verður samtykt óbroytt!
Tí, um Løgtingið nú áleggur sølu-MVG á bilar, sum longu eru skrásettir eftir galdandi reglum, ja, so er lóggávan sjálvsagt afturvirkandi! Og afturvirkandi lóggávan verður ein vanlukka fyri okkara fyritøkur!
Uppskotið má, í hvørt fall, broytast, so tað ikki fevnir um longu skrásettar bilar!

Tykkum til kunningar, so rindar ein miðal leigubilur landskassanum uml kr 23000 í MVG árliga av leiguinntøkuni. Hann koyrir uml 15000 km og brúkar sostatt uml 1000 ltr av brennievni, sum gevur landkassanum uml 5000 krónur í punktgjøldum og MVG, og síðan rindar hann partafeløgunum hjá landskassanum góðar kr 15000, harav uml kr 11000 til tunnlar og einar 4500 kr + MVG til flogvøllin.
Faktum er, at leigubilurin longu hevur rindað hinum almenna eina upphædd svarandi til MVGið, ið vanligir privatbilar rinda, áðrenn hann verður seldur endabrúkara!

Fyri okkum er avgjaldsbroytingin tí bæði óskiljandi og sera ørkymlandi!
Ikki minnst tað, at leigubilurin nú eisini skal rinda MVG av virðisgjaldinum, er jú púrasta ovboðið!
Hugsi tykkum tvær fyritøkur, sum innflyta hvør sín sama slag bil. Annar er vanligur sølubilur, meðan hin er leigubilur. Hví skal leigubilurin, tá henn verður seldur, rinda MVG av virðisgjaldinum, meðan sølubilurin sleppur undan?? Hvør er logiska grundgevingin??

Vit mótmæla tí, at virðisgjaldið á leigubilum verður MVG-skyldugt!!

Vit mæla til eina greiðari avgjaldsskipan fyri leigubilar, har bilarnir ikki gjalda virðisgjald og MVG við skráseting, men rinda hesi gjøldini eftir sama leisti sum innfluttir brúktir bilar, um teir verða seldir føroyskum endabrúkara! Ein slík skipan lættir munandi um arbeiði á Akstovuni/TAKS, at krevja inn og rinda út gjøld við skrásetan og útflytan av leigubilum, og minkar kapitaltørv/rentukostna hjá útleigarum!

Vit vóna, í hvussu so er, at sitandi Løgting ikki fer at lóggeva við afturvirkandi megi og heldur ikki lóggevur MVG-mun á somu bilum, hvørt hesir verða seldir av einum innflytara ella einum útleigara!

Á flogvøllinum 25. okt. 2025
Virðilig heilsan

Arctic.fo bilaleiga Magni Brøðraberg (sign)	62N bilaleiga Hanus Christophersen	ComeNorth.fo bilaleiga Sv. Aage Ellefsen (sign)

Rent.fo bilaleiga Bergur Joensen (sign)	Rentyourcar.fo bilaleiga Jákup Breckmann (sign)